

*Hugnaløtan í høllini byrjaði við solosangi og dansi. Børnini smæddust ikki at dansa...*

## FAKTA

Norðskála-Oyrar skúli varð tikin í nýtslu í september 1968. Skúlin er fyri næmingar í 1. til 7. flokki í Sunda Kommunu. Næmingarnir í 8., 9. og 10. flokki ganga í Felagsskúlanum á Oyrarbakka, sum er skúli fyri 8., 9. og 10. flokk hjá Hósvíkar, Hvalvíkar, Haldórsvíkar, Saksunar, Gjáar, Eiðis og Sunda Kommunu.
Í Norðskála-Oyrar skúla ganga uml. 60 næmingar og har starvast 7 lærarar.
Lærararnir eru:
Óli Jákup Joensen, leiðari
Arnold Joensen
Mikkjal Joensen
Thordis Dahl Hansen
Súsanna Hammer
Ingun Joensen
Sólgerð Andreassen
Tønnes Mikkelsen, pedagogur



*Tað var lív í køkinum á Norðskála-Oyrar skúla, tá børnini gjørdu pinnamat til við grind, spiki og turrum fiski. F.v:. Andrias, Hannes, Óla Kristian og Hans*

# ini hava tað gott

slignir ella stongdir úti frá felagsskapinum.

– Tað ber eisini til at venja børnini við at broyta málbrúkið, halda uppat at bannast og nýta niðursetandi, sárandi viðmerkingar um onnur, við at slíkt snøkt sagt ikki verður góðtikið á skúlanum.

Málið er at menna sjálvsálitið hjá hvørjum einstakum næmingi, og skúlin má geva næmingunum álit á seg sjálvar, so teir í góðum treysti møta tí nýggja við spenningi og arbeiðshugi. Tí er alneyðugt við góðari frálæru, sum skal geva næmingum upplivingar, har teirra verk eydnast og harvið geva teimum álit á egnar førleikar og evni og mennir ábyrgdarkensluna fyri egnari læring og egnum lívi.

Sunda kommuna leggur eisini stóran dent á, at fólkaskúlin gevur børnunum eitt gott støði at standa á, økir um hugin hjá teimum at læra.

– Skúlagongdin er í alt størri mun vorðin ein hornasteinur undir menningini hjá øllum børnum. Skulu tey mennast og trívast við teimum krøvum, ið dagsins samfelag setir til tey, er neyðugt at undirvísingin fer fram í einum góðum og tíðarhóskandi umhvørvi, stendur millum annað at lesa á heimasíðuni hjá Sunda kommunu.



*Lærarskúlanæmingarnir, sum herfyri vóru í starvsroynd í Norðskála-Oyrar skúla. Í skúlanum hava tey leingi ynskt at prýða høllina. Tí var hugskotið hjá Súsan, um at gera myndateppir úr tøvdari ull, júst tað rætta, og gjørdi henda dreym til veruleika. Omanfyri síggjast tvey av vøkru myndateppunum úr tøvdari ull, og við føturnar hava tær stóra hvalin, sum eisini er gjørdur úr tøvdari ull*